

*Av Krosstindi sæst víða. Í neðra er Oknadalsskor og suðuri í havi liggja oyggjarnar lið um lið. Fyrst Koltur og Hestur, síðan Sandoy og Suðuroy sum kámast eitt sindur burtur í táminum*

*Mynd: Edvard Joensen*

*Framhald av síðu 28*

setir seg aftur og er burtur. Eg síggi hann ikki. Løgið. Kanska ein huldumaður. Men tað fer neyvan at bera til í hesum góðveðrinum. Teir plagdu at vera úti í mjørka og ringum sýni. Nei, nú er hann aftur farin til gongu. Men hesaferð beint tvørtur um hagan.

Gott er, eg møti honum helst á veg omanaftur, um eg ikki geri av at fara á Malinstind eisini.

So eri eg á Húsafelli. Her er eingin gestabók meira, so eg havi ikki annað at gera, enn at hyggja meg um. Og tað er av sonnum ein sjón, sum vekir fosturlandsást í sál, sum Mikkjal á Ryggi sigur í yrkingini um Wenzel Hammershaimb.

Tveir kappar úr grannalagnum. Her liggur Steigin beint undir, og longri burtur tekki eg Rygg í Miðvági. Helst eru Beitishúsini har einastaðni inni í rúgvuni. Hinumegin liggja Malinstindur og Heldarstindur. Hetta fjallið við tí ófrættakenda navninum, sum minnir aftur á sinnopsgass og mansskaða. Tað kylir í mínum kjøti, sum Gyðja segði á sinni.

Og eg vendi mær vestur yvir aftur. Síggi alla oynna. Sandavágur er næst, og inn á Miðvág. Yvir um Leitið, har vatnið liggur og líkist einum firði, sum stingur seg inn í landið. Úti í Oyrum er bert ein heilt kløn strika at síggja, sum sigur tí, sum veit tað, at har er ikki opið.

Tindhólmur stingur høvdið undan, og longst burtur liggur Mykines í táminum.

Men oman aftur skal farast, hóast alt. Og eg havi gjørt av, at eg fari ikki á Malinstind í dag. Tað má bíða til einaferð í summar.

Taki meg spakuliga oman norður eftir. Einar tvær harur fara undan mær, og onkur hendinga lógv er at hoyra.

Gangi fram við tjørnini, sum eg havi hoyrt skal vera fullav kombikkum. Royni at trampa á bakkanum fyri at vita, um okkurt livir. Men tað er so eiðasørt. Har er steindeytt.

Havi ikki møtt tí døkktklædda manninum enn, og eg síggi hann heldur ikki úti í hagnum. Hann man vera fairn at húsum sama veg, sum eg sá hann koma.

So oman millum likkurnar, sum eru farnar at savnast her omanvert garðin. Tað er ov tíðliga enn, til at tær hava vorpið, men í tær, so næskar tær ikki eru kortini. Larma illa og vilja hava meg at pakka meg burtur. Her havi eg einki at gera.

Og so gongur tað, sum tað kann. Fari um garðin og gangi eftir vegi at húsum.

Stuttur var túrurin í tíð, men drúgvur í upplivingum. Tað tekur helst eina løtu at fáa inntøkini at festa seg og brúka tey til nakað skilagott, hugsi eg og hyggi at klokkuni, sum sigur, at nú, eg eri aftur í túninum, eru bara tríggir tímar, síðan eg fór. Tað haldi eg sjálvur vera skjótt gingið.


**Alt innan Hita Vatn Sanitet**

**søla og arbeiði**

**vit geva óbindandi tilboð**

tel 470000

**Leivur Nattestad Sp/f**

370 Miðvágur tel 33 35 09 fax 33 33 09 fartel 21 35 09
leivur-n@post.olivant.fo






| | vanligt hald | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovning | 250,- | 0,- |
| Mánaðargjald | 115,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 1,90 min | 2,25 min |
| Samrøður - kvøld | 1,15 min | 0,75 min |
| SMS-boð | 0,90 | 0,50 |

GSM frítíð kann bert nýtast í Føroyum. Ókeypis stovnan er galdandi frá 1. maj til 31. juli. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.

team85

GSM FRÍTÍÐ

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum




## VIÐMERKINGAR

# Ímeðan vit bíða eftir svi(ð)anum?

**Tórbjørn Jacobsen**
*fólkatingslimur*

**Danski móðirflokkurin helt seg gera føroyska javnaðarflokkinum ein beina, tá ið teir lótu danskar spinndoktarar skipa valstríðið í 98. Royndin miseyðnaðist. Teir raktu ikki føroysku fólkasálina í solar plexus. Í vár plagieraðu teir móðurflokkin við verri úrslitið, og nú bíðar føroy ingurin spentur eftir, hvussu Hendrik, Katrin, Andrias, Jóannes, Kristian, Gerhard & Vilhelm fara at rigga í einum svenskum hami eftir at formaðurin í Degi og Viku boðaði tjóðini frá, at ein svii nú var boðsendur, at fáa flokkin í spónalagi aftur.**



Ismurnar fingu ongantíð fótin fyri seg í Eysturoynni. Tesurnar, um orsøkina, kunna vera fleiri. Ein er, at flestu húski áttu hús, trøð, kúgv, neyst og bát. Hendan sjálvstøðan hevði tað við sær, at teir ikki vóru so lættir at syfta av fremmandum tonkum. Kapitalistarnir bóru seg kanska ikki so býttliga at, sum aðrastaðir, livdu sum fólk flest, og framherjarnir í arbeiðarørsluni hava seigliga og djarvt stjórnað sínum feløgum til limanna besta. Tá ið tað kravdist, lupu teir heldur ikki av, eitt nú tá ið Erlendur Patursson stríddist fyri rættindunum hjá føroyskum fiskimonnum, í døpru fimti-árunum.

Persónsdyrkan er eisini ókend í oynni. Hóast hann var ein politiskur gigantur, eftir føroyskum mátistokki, so fara gøtumenn neyvan nakrantíð at umhugsa tankan, at telgja eina skurðguðamynd av Øregaard og sveipa hana uppá eitt bróst í skúlanum. Í apríl mánaða 98 hendi tó ein broyting. Tá kom ein plastmynd, av formanni javnaðarfloksins, at standa inni á Skipaneskrossinum. Demoniseraður. Einar fýra til fimm manshæddir. Hvíttklæddur. Ermarnar rullaðar upp á vinstra armi. Slips. Og obligatoriska pípan stútaði sjálvandi fram úr myndini. Modellið var danskt. Stoypt av donskum spinndoktarum til ein esbjergensara, ið hevði ræði á Danmørkini, Føroyum og eftir øllum at døma eisini Føroya Javnaðarflokki.

Royndin miseyðnaðist. Jarðbundnu eysturoyingarnir skiltu í hvussu er ikki eitt kvekk av hesum. Kendu valla mannin. Hann var heldur ikki uppstillaður í oynni. Okkurt bendir á, at danskir spinndoktarar hava verið framvið aftur hesaferð, men tekin eru um, at teir finna ikki á beint. Finna ikki innar í solar plexus á føroysku fólkasálini, so nú vóru góð ráð dýr, - tá ið hetta nú ikki kundi fyriskipast innanvert rimarnar á ríkisfelagsskapinum. Tað sum danir og føroyingar ikki megnaðu er nú lati einum sosialdemokrati úr svítjóð at fara í takholt við.

Um teir skilja føroysku fólkasálina betri enn aðrir er ilt at meta um. Hava verið lítið um okkara vegir. Ein var tó, ið kallaðist Rundwall. Búði í Villumsgøtu í Havn. Hann var kavari. Fekst við havnabygging, og tað varð hildið, at hann hevði eina rímiliga góða tendring. Tá ið hann kavaði herumleiðir, hevði hann ein kendan heiðamann sum hjálpara. Hesin skuldi ansa luftkompressaranum og røkja neyðuga tvívegis-telefonsambandið, av bolverki á botn. Einu ferðina var hjálparin komin sær í tos við onkran bygdamann á havnalagnum, og varnaðist ikki beinanvegin, at tað kimaði á máltráðnum. Tað gekk ein góð løta. So tók hann rørið av, og spurdi tey legendarisku orðini: "Hvønn tosi eg við?" Rundwall, ið var hin einasti sum kundi svara, og sum var um at kvalast av iltmanguli, setti føtur í spenni, og kom við sjógv á baki úr sjóvarmálanum. Krøkti í oljudansin hjá hjálparmanninum og hirdi hann út av bryggjumúlanum. Kort prosess. Hann skilti eftir øllum at døma ikki hendan serføroyska fasongin: Tað sum ikki hendir ídag, tað fáa vit bara á skaftið ímorgin, - ístaðin.

Tá ið Jógvan Sundstein royndi at stýra danska heimastýrinum í norðurhøvum, valdi danski uttanríkisráðharrin, Uffe Elleman-Jensen, at halda norðurlendskan uttanríkisráðharrafund í Føroyum. Hetta gekst í stóran mun eftir ætlan. Tó hómaðist ein disharmoniiur, tá ið Jógvan spurdi um ikki føroyingar eisini kundu luttaka á hesum felags norðurlanda fundi. Uffa dámdi ikki spurningin og svaraði beisktliga: Nei. Svenski uttanríkisráðharrin Steen Anderson, ið mundi skilja lítið av hesum danska malsjónskni, segði tá tey kendu orðini: "Tá er ikki nógv at gera. So mega tit bara bíða haðartil tit eru fræls tjóð við teimum rættindum ið hartil hoyra." Øðin spann í danir, og tað hoyrdist, at maðurin fekk álvarsliga, diplomatiska reprimandu fyri sítt sjálvsagda munnlætni.

Í einu røðu, sum varð hildin tá ið sosialdemokratiski flokkurin í Skåne hevði seksti ára føðingardag, endurgav Olof Palme kenda pólendingin, heimsspekingin Leszek Kolakowski fyri at hava sagt: "Vinstrivongurin skilir utopia út, - á sama hátt sum brisið - ella búkspýttkertilin - skilur út insulin." Og Palme spyr sjálvur: "Skal hetta veruliga skiljast soleiðis, at politiski vinstrivongurin er lagnudømdur til politiskt fantastarí, dreymaslátur tilevnaði við skrivaraborðini ella til flýggjanina inn í eina óveruliga framtíð?" "Nei, soleiðis var hetta sjálvandi ikki hugsað. Hevur vinstrivongurin eingi utopia, tá fær hann ikki verið til. Honum tørvar áhaldandi at seta sær mál, sum her og nú, í løtuni, eru órøkkandi, men sum geva dagsins broytingum eina meining."

Eitt politiskt og hugsjónarligt stórmenni var Palme. Ov djarvur fyri onkran. Tí slapp hann ikki at liva. Kendastu orð hansara er helst hesi: "Politikkur - tað er at vilja nakað. Sosialdemokratiskur politikkur, tað er at vilja broytingina, tí broytingin kann hava við sær batar, kann geva hugflogi og virkisorku føði, og kann hartil lynna undir dreymar og visiónir. Men sjálvandi má viljin hava eina kós og broytingin eitt mál. Sosialistarnir eru nóg hugstórir til at vilja nakað, tí hugsjónin er drívmegi viljans, og vit er nóg djarvir at fara undir broytingar, tá ið broytingarnar kunna gera utopia til veruleika."

"The sweedish link" hjá Føroya Javnaðarflokki ber brá av frustratión og ræðslu. Kanska eisini ómegd. Undarligt at føroyskir javnaðarmenn ikki eru teir bestu til at rannsaka seg sjálvar, og haðani at leggja eina leið sum ber á mál. Kanska er danska sambandið framvegis ov máttmikið. Tungt er sleppa teimum, ið stóðu við vøgguna. Hugsjónarloysi hevur tað við sær, at tú rekst sum tongul í brimi, stýrdur av skiftandi rákum. Kanska hevði skaldi meiri rætt enn gott er tá ið hann segði, at móðurlandið hjá føroyskum javnaðarmonnum altíð er har sum pengarnir hjá hinum eru.

Størsti trupulleikin er sjálvandi tjóðskaparspurningurin. Vit sóu tað nú aftur undir samgongusamráðingunum. Álíkt nevaleiki ímóti skuggum. Tað einu løtuni fyri øllum. Í aðru syftu ímóti øllum. Alt eftir hvør hvalur kom upp at blása og nær. Síðani lotaði ikki úr hanakjafti. Tað einasta fjøldin veit er, at bíða verður eftir einum ókendum spinndoktara úr svítjóð fyri at fáa flokkin í spónalagið aftur. Og er hann hugsjónarliga í ætt við Palme og Anderson, tá ger hann kanska skarvslopið, ið fær flokkin inn í týðningarmikla stríðið fyri skipanina av føroyska nationalstatinum. Ermarnar rullaðar niður aftur og ketilsdraktin smoygd um herðarnar. Tá man fara at grógva um gangandi fót hjá politiska frælsinum í Føroyum.

Alt kann nú henda. Spenningurin økist. Um hann roytir teir út av bolverkinum, og tað fer at svíða sum svøllur ella hesin ókendi sviin fær alt aftur á rættkjøl, ja tað spyrst sum livst, sum Virgállur við Liða, so filosofiskt, plagar at taka til.

# Vil ikki at tað verður sagt ósatt um meg av blaðnum Trúboðin

**John S. Myllhamar**
*trúboðari*

Greinin niðanfyri varð send blaðnum Trúboðin sum eitt aftursvar, men varð ikki tikin upp - varð ignorera. At greinin, sum stóð í Sosialinum síðstu viku, var send Trúboðanum, stendur ongastaðni

**Viðmerking til formannin í Heimamissiónini**

At innlegg mítt fór at fáa sama heiðurspláss og líka stórar stavir sum meinigheitin í Hoyvík fekk í Trúboðanum, hevði eg sjálvandi ikki vænta, men metti kortini, at eg skuldi senda tað til Trúboðan, tá ið tað var ein viðmerking til nakað, sum staðið hevði í hesum blað. Men orsaka at eg kom at taka pláss í blaði tykkara. Væntaði kortini, at eg kundi fáa viðmerkingina við í næstseinasta blað tá ið hon varð send í góðari tíð. Men sum eg skilti, varð avgjørt, at hon ikki mátti koma við áðrenn Ársmøti. Kortini eri eg vissur í, at tað var ikki blaðstjórin, sum foraði fyri hesum.

Grundin til at eg gjørdi viðmerkingar til fríkirkjuna var, at Trúboðin altíð er skjótur at koma við rættleiðingum tá ið okkurt er áfatt við fólkakirkjuni, og onkur prestur ikki ger blaðstjórnini eftir vild, men ongantíð eitt einasta orð um sveimarí og falslæru í øðrum samkomun og kristiligum bólkum, sum er líka skaðiligt fyri fólk okkara. At blaðið kom við einum objektivum tíðindastubba, um hvat hendir í kirkjum og samkomum kring heimin, eins og Indre Missións Tíðindi vanliga gera, vil ein og hvør meta er náttúrligt, men at fylla málgagnið hjá Heimamissuiónini við talum og myndum frá vígsluni í einari aðrari kirkju, halda mong við mær vera løgið. Her var eitt gott høvi hjá Trúboðanum, at gera viðmerkingar til eina læru, sum vrakar læru og bygna fólkakirkjunnar.

Svar fekk eg so einki uppá, hvat høvuðsstýrið sigur til, at aðalskrivarin, uttan at vera biðin, ber heilsan og góðynskir frá Heimamissiónini til hesa nýggju meinigheit, sum er brotin út úr okkara kirkju vegna tað, at vit ma. hava eina skeiva læru. Eg persónliga hevði mett tað bæði burtur við og óerligt um eg bar teimum nakra heilsan. Men eg hevði heldur ikki væntað nakað svar. Heldur varð hetta snara inn á onnur ting, við at vísa á allar tær ymisku samkomur, sum vóru tilstaðar við heilsanum tá ið Leguhúsið í Nesvík varð vígt. Nú var eg sjálvur tilstaðar tá, men minnist ikki eina einastu samkomu uttanfyri fólkakirkjuna írokna hana í Hoyvík, vera tilstaðar har við nøkrum heilsannum og góðynskjum. Men formaðurin í Heimamissiónini er vist meira sannorðaður enn eg, so tað má vera eg, ið eri gloymskur.

Nú veit eg ikki um hetta verður tikið upp í Trúboðanum, tá ið so torført var, at fáa mítt fyrra innlegg við. Men okkurt lítið horn finnist kanska, og so skal eg í framtíðini ikki taka pláss í blaði tykkara.